## Nummar 4 á 400

Pál gjørdist akkurát ov stuttur til heiðursmerki í 400 frí á World Cup í Moskva, hóast hann setti føroyskt met við meira enn einum sekundi. Tíðin hjá honum var 3:41.40, har føroyska metið hjá honum frá EM í Rijeka í fjør var 3:42.57. Nikita Lobintsev úr Russlandi vann gull við tíðini 3:38.40, meðan danski Mads Glæsner vann silvur við 3:40.10, og russiski Mikhail Polishchuk vann bronsu við 3:40.65.



## Luca Toni rýmdi í hálvleikinum

Italski álopsspælari Luca Toni kann vænta sær ein ordans umgang frá leiðsluni í FC Baryen, eftir at hann um vikuskiftið rýmdi av leikvøllinum í hálvleikinum. Luca Toni varð skiftur út í hálvleikssteðginum, og hann gjørdi ikki mætari, enn at rýma heim eftir útskiftingina. Dysturin, sum var ímóti Schalke, endaði við javnleiki 1-1.

# (mis)brúkið nú Pál



### Sigurin hjá Pál Joensen er ein staðfesting av, hvønn mun tað kann gera, um elita sleppur at vera elita



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Ein vanlig fatan er, at Pál Joensen er eitt talent av tí slagnum, sum tað ganga áratíggju ímillum, at vit síggja her í Føroyum.

Men hetta vildi verið ein fúl undirmeting av tí arbeiði, sum liggur aftan fyri framúrskarandi úrslitunum, sum Pál hevur vunnið. Ikki bara í Moskva leygardagin, men sum heild seinastu árini.

Tí eitt er talent. Og sjálvandi hevur Pál góð evni at svimja. Annars hevði hann ikki nakað gullmerki um hálsin.

Men tað er langur vegur frá talentinum og upp á heimstindin. Var talan bara um talent av tí sjáldsama slagnum, so kundu vit bara sóla okkum, meðan vit bíða eftir næsta mega-talentinum, men júst tað er ikki tað, sum Jón Bjarnason velur at gera. Og júst tað er ikki tað, sum Føroyar skulu velja at gera.

Sigurin hjá Páli vísir meira enn nakað annað, at hart arbeiði, trúgv upp á egin evni og enn meira hart arbeiði lønar seg. Og tað hevur eisini lønt seg, at Pál hevur fingið sersømdir til at menna sítt talent. Bæði við skúlagongdini og við stuðulin, sum nú verður latin til úrvalsítrótt.

Og júst her eigur sigurin hjá Páli at brúkast – og kanska enntá misbrúkast. Tær 350.000 krónurnar, sum eru lætnar til svimjingina hjá vágbinginum, eru nevnliga peanuts í mun til tað, sum tær eru verdar fyri føroyska samfelagið. Hóast svimjingin ikki er heimsins mest eksponeraða ítrótt, so hava vit loksins nakað annað enn fótbóltslandsliðið at vísa á, tá umheimurin skal fáa kunnleika til Pál. Og sum grundarsteinur í tjóðarbygging eru sigrar av hesum slag ófatuliga týðandi. Ja – av slíkum slag, at teir ikki kunnu betalast í pengum.

Tí eigur føroysk svimjing og føroysk ítrótt at brúka úrslitið til at vísa á, hvat vit kunnu, um vit bert fáa møguleikan.

Politiski myndugleikin skal aftur og aftur minnast á, hvussu týðandi tað er at skapa røttu karmarnar hjá okkara allarbestu. Minnast á, at hóast samhaldsfesti hevur sjálvsagdar røtur í føroysku mentanini, so eru tað eisini tíðir, har jantulógin skal jarðast. Tá hava tey bestu møguleikan til ikki bara at verða best – men nógv best!

# Størsta avrikið nakran tíð

### Forsetin í svimjisambandinum blunkar ikki við at kalla World Cup-sigurin hjá Pál fyri størsta ítróttaravrikið nakrantíð



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

- Hetta var akkurát tað, sum vit øll ynsktu. Ikki minst Pál sjálvur, sum var sera vónbrotin um HM-úrslitið í Rom fyrr í ár. Síðani tá hevur hann arbeitt knallhart móti at vinna á tí vónbrotinum, og tað eydnaðist so sanniliga í dag.

Sjampagnan var ikki komin á borðið hjá Jon Hestoy, forseta í Svimjisambandinum, men hetta var nú ikki, tí hann ikki fegnaðist.

- Eg liggi sjúkur í seingini. Men eg skal lova tær, at hevði tað ikki verið, so sat eg við sjampagnuni nú, segði ein stórflennandi forseti í løtunum eftir sigurin í Moskva.

- Tí hetta er enormt. Skal eg sammeta ein slíkan sigur við aðrar ítróttagreinar, so svarar tað væl til, at ein tennis-spælari vinnur eina av teimum fýra Grand Slam-kappingunum. Alt tað, sum dugir at krúpa innan heimselituna, er við til slíka kapping, so hetta staðfestir veruliga, at Pál telist millum heimsins bestu, sigur Jon Hestoy.

- Og so hatta eisini ein heilt fantastisk tíð, sum hann svimur, so nú verður spennandi at síggja, hvussu úrslitið verður, tá hann skal svimja í Stockholm mikudagin og í Berlin komandi vikuskifti. Kenni eg hann rætt, fer hann eftir tíðini hjá Hackett, sigur Jon Hestoy.



Størsta føroyska ítróttaravrikið nakrantíð. Jon Hestoy blunkar ikki við at seta avrikið hjá Páli í tað høpi, sum tað hevur uppiborið

Og so leggur hann afturat, at úrslitið ikki hevði verið gjørligt, var tað ikki fyri tær 350.000 krónurnar, sum nú verða latnar í stuðuli.

- Hetta hevur gjørt, at Pál veruliga kann liva sum professionellur svimjari. Eitt nú við at hava fysioterapeut við á ferðini. Tú kanst ætla, hvussu tað er, tá tú svimur 1.500 metrar við fullari ferð. Kroppurin er sum ein steinur, og tí er altavgerandi, at tú hevur so góðar fortreytir sum gjørligt at fáa møðina úr kroppinum. Tú skalt minnast til, at enn er Pál als ikki niðurtrappaður, og tí er talan um at venja við fullari ferð, samstundis sum hann tekur lut í kappingum móti heimstoppinum. So tað eru smálutir av hesum slag, sum kunnu flyta seinastu sekundini, sigur Jon Hestoy.

# 3,13 sekund frá metinum

### World Cup-sigurin hjá Pál hevur vakt ans um allan svimjiheimin.



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Eitt er, at Pál Joensen við sigrinum hevur sligið sítt navn enn meira rimmarfast millum bestu langteinararnar í heiminum.

Annað er, at Pál, sum svam teir 1.500 metrarnar upp á 14.32,64 bara var 3,13 sekund frá World Cup-metinum í 1.500 metrum á stuttbana.

Tað metið setti Grant Hackett afturi í ár 2000. Grant Hackett er maðurin, sum í dag eigur heimsmetið á 1.500 metrum á langbana.

Leggjast kann afturat, at gamla metið hjá Pál á teininum var 14.39,99.